**Sjálvstýrisflokkurin**

Landsstýrismálanevndin
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

31. mars 2008

**Evni: Viðgerð landsstýrismansins í almannamálum av sølu av sjúkrahúsbygningum (íbúðabygningum, løgujáttan)**

Góðu tit,

Vísandi til § 38 í stýrisskipanarlógini og § 2 í starvsskipan nevndarinnar heiti eg við hesum á landsstýrismálanevndina um at taka nevnda mál til viðgerðar.

Kunnleiki mín til málið er fyrst og fremst grundaður á álitið **Frávik**, ið landsgrannskoðanin hevur gjørt fyri fíggjarárið 2006 – Frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu o.a.

Á síðu 66 verður nevnt undir punkti 9.1.3 (konto 8.20.3.05) at eftir játtanini skuldi inntøka verið staðfest uppá kr. 30.000.000, men ongin inntøka er skrásett í roknskapinum. Frávikið er sostatt størsta einstaka á málsøkinum (sí talvu á síðu 65).

Sum skilst er eisini í hesum føri talan um ofta reistan spurning: "Talan er um ætlaða søluprísin [ið stóð á fíggjarlóg] 2005, og aftur í 2006 [tá] mettur til 30 mió.kr. Á fíggjarlógini 2007 er søluprísurin mettur til 35 mió.kr." (síðu 66).

Landsstýrismaðurin hevur borið seg undan at fremja málið og landsstýrismaðurin hevur verið so langdrigin at meta um virði og seta bygningarnar til sølu, at bygningarnir eru fyrst mettir at verða hækkaðir heilar 5 mió.kr. í virði – og síðani helst at vera falnir í virði samsvarandi búskapargongdini og hækkaða útboðið av íbúðum.

Samstundis eru ábendingar um, at "Ongar umvælingar eru gjørdar síðani [2002]" (sic!). Landssgrannskoðanin vísir á, at sjálvt í ringastu krepputíð var hildið neyðugt at halda viðlíka almennar bygningar. Sagt verður at "Eftir er bert at staðfesta, at einki skipað viðlíkahald hevur verið av íbúðabygningunum, hóast góðar tíðir í Føroyum... eisini kundi verið áhugavert at mett um, hvat vantandi viðlíkahald hevur kostað." (síðu 67 til 69). Hetta eigur serliga at verða tikið upp.

Greitt tykist vera, at landsstýrismaðurin hevur misrøkt málið og ikki gevur løgtingsgrannskoðarunum gætur. Tí verður nevndin biðin um at taka málið upp.

Vinarliga

Kári á Rógvi løgtingsmaður

-1. APR. 2008

Løgtingið j. nr. 713.20080007-1